INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

# Reglugerð fyri útjavningarstuðul til útjaðaraøki

Reglugerðin fevnir um umsiting av útjavningarstuðli sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1998.

**§ 1.** Endamálið við útjavningarstuðlinum er at útlíkna part av meirkostnaðinum av at flyta olju og annan farm innanoyggja hjá fastbúgvandi í útjaðaraøkjunum í Føroyum. Almennu flutningsfeløgini Strandfaraskip Landsins (SL) og Postverk Føroya (PF) virka eftir hesi reglugerð.

**§ 2.** Niðanfyri nevndu oyggjar/bygdir eru at rokna sum útjaðaraøki í hesum samanhangi: Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Nólsoy, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

**§ 3.** Fullur (100%) útjavningarstuðul verður latin til hesar vørubólkar:

| Vørubólkur | Frá | Til | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| Oljutunnur | X | X | |
| Neyt (livandi) | X | X | Slaktineyt frá og kálvar til |
| Gassfløskur | X | X | |
| Kraftfóður | | X | |
| Kjøt, ull og grønmeti | X | | Slakt og lokal framleiðsla |
| Hoyggj, pelar og hegn | | X | |
| Kunsttøð | | X | |
| Smápakkar | | X | Innanlands max. 30 kg. |
| Vinnupakkar til handlar hjá fastbúgvandi | | X | Vørur til víðarisølu, max 50 kg., max. 0,25 $m^3$ |

*Stk. 2.* Fyri flutning við SL eru hesar serreglur galdandi:

1. SL skipar soleiðis fyri, at tey útjaðaraøki, har tørvur er á tí, fáa 2 farmatúrar um árið (t.e. túrar við skipi, ið kann taka størri farm, so sum traktorar o.t.)
2. SL eigur at vísa á betri hátt at flyta farm, so flutningurin verður so rationellur sum møguligt (innpalling, samlan av kolli o.í.)
3. SL flytur smápakkar, sum eru max. 0,12 $m^3$.
4. SL eigur at vísa farm til AA og/ella PF, har tað er ynskiligt.

*Stk 3.* Fyri flutning við PF, eru hesar serreglur galdandi:

1. Av teimum vørubólkum, ið nevndir eru undir stk. 1, veitir PF bert stuðul til "kjøt", "smápakkar" og "vinnupakkar til handlar hjá fastbúgvandi".

**§ 4.** Tá eitt viðskiftafólk kemur við farmi til ella frá útjaðaraøki, verður farmabrævið skuldskrivað debitorkonto, sum er markað til útjavningarstuðulin. Á hesi konto standa, fram til 31. desember 2006, hjá SL kr 550.000 og hjá PF kr 100.000. Tá játtanin er uppbrúkt, t.v.s. saldoin er komin á kr. 0,00, verður kontoin stongd, og stuðulin steðgaður. Eftir hetta gjalda viðskiftafólk vanligt farmagjald.

*Stk. 2.* Innlendismálaráðið kann gera av at flyta eina restjáttan frá einum stovni til ein annan, um mett verður, at stovnurin ikki fær brúkt alla játtanina innan árslok. Stovnarnir hava skyldu til at melda aftur í seinasta lagi 1. november 2006, um øll játtanin verður brúkt innan árslok.

Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 358080 · faks 358085 · lmr@lmr.fo · www.lmr.fo

*Stk 3.* Aftaná árslok skal Innlendismálaráðið hava ein roknskap, sum greitt vísir, hvussu játtanin er brúkt. Stovnarnir skulu sum minsta mark lata upplýsingar sambært hjálagda skjali. Roknskapurin skal vera Innlendismálaráðnum í hendi í seinasta lagi 1. februar árið eftir stuðulin er veittur. Roknskapurin skal hava grannskoðara váttan, at stuðulin er veittur sambært reglugerðini.

§ **5.** Fyri at farmur kann koma undir hesa reglugerð, skal sendarin og/ella móttakarin hava fastan bústað í útjaðaraøkinum sbrt. skrá hjá Landsfólkayvirlitinum.

§ **6.** Verður brot, so sum misnýtsla, falsan og líknandi staðfest á hesa reglugerð, kann rætturin hjá viðkomandi til útjavningarstuðul verða strikaður.

§ **7.** Henda reglugerð hevur gildi frá 1. januar 2006 og samstundis fer reglugerðin frá 31. mars 2005 úr gildi.

**Tórshavn, tann 7. februar 2006**

**Jacob Vestergaard**
landsstýrismaður

Atlantic Airways (AA) hevur játtað at virka eftir somu reglum, og fær kr. 350.000 á konto til at veita stuðul fram til 31. desember 2006. Tá játtanin er uppbrúkt, t.v.s. saldoin er komin á kr. 0,00, verður kontoin stongd, og stuðulin steðgaður. Eftir hetta gjalda viðskiftafólk vanligt farmagjald. Í seinasta lagi 1. november 2006 vendir felagið aftur til Innlendismálaráðið við einari meting av, um øll játtanin verður brúkt innan árslok.
Um mett verður, at felagið ikki fær brúkt alla játtanina innan árslok, kann Innlendismálaráðið gera av at flyta eina restjáttan frá felagnum til ein av omanfyrinevndu stovnum.
AA hevur hesar serreglur fyri farm:

1. Fyri byggitilfar, sand, sement o.a. verður eingin stuðul veittur.
2. Fyri amboð, tól, maskinur o.a. verður eingin stuðul veittur.
3. Har tað er sjóvegis samband, eigur AA vísa tyngri farm til SL og/ella PF.
4. AA flytur smápakkar, sum eru max. 0,12 $m^3$.
5. AA eigur at vísa á betri hátt at flyta farm, soleiðis at flutningurin verður so rationellur sum møguligt (innballing, samlan av kolli o.t.)
6. AA kann flyta vørur sum slingur, um tað verður mett at verða rímiligt - víst verður til 3 og 5.

*Skjal 1:*

***Uppgerð yvir útjavningarstuðul til útoyggjar 2006***

| Øki | Frá | Til |
|---|---|---|
| Fugloy | | |
| Svínoy | | |
| Kallsoy | | |
| Mykines | | |
| Skúvoy | | |
| Hestur | | |
| St. Dímun | | |
| Nólsoy | | |
| **Tilsamans** | | |

*Grannskoðara váttan at uppgerð stovnsins/felagsins er í samsvari við reglugerðina fyri 2006*